Tvíhús til sølu

Adressa: Undir Krákugjógv 13, 100 Tórshavn
Stødd á húsum: 38 m² x 2, umframt kjallara
Loft: Hjúnarrúm, 2 kømur, gongd v/trappu
Miðhædd: Køkur- stova, wc/bað, gongd v/trappu, durur
Kjallari: Fýrrúm, vaskirúm, annars óinnrættaður
Stødd á grundoki: Uml. 424 m²
Byggiár: 1945
Yvirtokudagur: Eftir avtalu
Kostnaður: Kr. 1.000.000,- ella hægsta boð yvir

Sosialurin.311090

Áhugað verða biðin um at ringja ella støkka inn á gólvið hjá Húsamekling. Her kunnu vit greiða nærri frá ognini, og avtala tíð at sýna húsini fram.

HÚSAMEKLING
Sp/f Protek · Vaglið · Box 331 · 110 Tórshavn
Tel 319321 · Fax 319331 · e-mail: protek@post.olivant.fo

Røktar- og umlættingarheimið

Lágargarður

lýsir eftir sjúkrarøktarfrøðingi í deildarleiðarastarv

Frá 1. oktober 2004 er deildarleiðarastarvið á Handarustovu leyst at søkja.

Handarastova er eindin hjá okkum sum hýsir teimum sum hava demenssjúkur, tískil skal umsøkjarin hava serkunnleika til/og áhuga fyri hesari sergrein og kenna til meginreglarnar í demensumsorgan.

Førleikakrøv annars eru: útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur við leiðsluroyndum og góðum samstarvsevnum.

Starvið er fulltíðarstarv og lønt sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 316788.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til

Leiðaran á Lágargarði
Stoffalág 84
Box 1188
110 Tórshavn

Umsóknarfreist 30.8.04.

Hús í Kambsdali

Hesi frálíku hús til víddar uml. 220 m² í tveimum hæddum, umframt garagu, bygd á grundstykki til víddar 543 m² eru til sølu.

Í ovaru hæddini eru 3 kømur, stova, køkur og baðirúm og niðara hæddin er partvís innrættað: 2 kømur og baðirúm umframt hjallur og kjallararúm.

Húsini sum eru bygd í 1988 vera seld fyri hægstbjóðandi, um hetta er eitt hóskandi boð.

Nærri fæst at vita um húsini, yvirtøkudag v.m., við at ringja til okkara.

Demmus Hentze
landsrættarsakførari

Turið Debes Hentze,
advokatur

Bringsnagøta 23 · Postboks 236 · FO 110 Tórshavn
Tlf. 311460 · fax 318164
e-mail: hentze@post.olivant.fo

Internet Sosialur in

Starvsfólk til barnaansingina í Leirvíkar Kommunu

Til frítíðaransingina verður søkt eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar/viku at byrja 01.oktober 2004 ella skjótast gjørligt.

Til barnagarðin verður søkt eftir einum hjálparfólki at arbeiða 25 tímar/viku at byrja 1. oktober 2004.

Løn samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og FKA.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Leirvíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. august 2004 kl. 12.00.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett fyribils.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran Annu Djurhuus á telefon 443 125 ella 743 125.

Leirvíkar Kommuna
Postboks 42
520 Leirvík

Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulspedagogi/hjálpara til ein 9 ára gamlan drong í Runavíkar kommunu, at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðið hjá stuðlinum er í samstarvi við familjuna og Barnaverndarnevndina at stuðla dreinginum og familjuni í at fáa ein innihaldsríkan dag eftir skúlatíð.

Arbeiðstíðin er seinnapart 20 tímar um vikuna.

Barnaverndarnevndin skipar fyri, at stuðulsfólkið fær supervisión og ráðgeving eftir tørvi.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum verður at senda Barnaverndini í seinasta lagi fríggjadagin 27 august.

Runavíkar Kommuna

Barnaverndarnevndin
Runavíkar kommuna
Heiðavegur 26
600 Saltangará

Eiðis skúli

Vegna avlopstímar verður søkt eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2004/2005. Talan er um tilsamans 23 tímar.

Høvuðslærugreinirnar eru føroyskt í 1. flokki og rokning í 2. flokki.

Tann, ið settur verður, skal belst byrja 23. august.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi leygardagin 21. august kl. 12.00.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til fyrstalæraran tlf. 423579 ella 229045.

Skúlastýrið
v/ Anniku Egholm
470 Eiði

Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

linis ur ann ni ari
r ur na r
i r r u ur
na a s a fr l. una
fr a a fr l. lf.

Vegna skeið/skúla

er ungdómsráðgeving stongt frá fríggjadegnum 13. august 2004 til 20. august 2005.

Átrokandi boð kann leggjast á tel. (0045) 28 42 23 16

UNGDÓMSRÁÐGEVING Í HAVN

Sosialurin

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 616, P/F Laxá, 695 Hellur.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Frímund Hansen, Spógvavegur 39, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Ragnar Joensen, Skræddaragøta 10, 188 Hoyvík.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Frímund Hansen, Spógvavegur 39, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Ragnar Joensen, Skræddaragøta 10, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 12. august 2004

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 293, P/F Poul Michelsen, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
10.08.2004
Lækkan av P/F-peningi við kr. 30.000,00 til kurs 1.264,3678 til kr. 843.600,00,viðtikið 30.03.2004 er nú gjøgnumført.
Kapitalur: Kr. 843.600,00

Skráseting Føroya tann 12. august 2004

Kristin Balle

Handil til sølu

Vegna serligar umstøður er handil okkara í Klaksvík til sølu. Handilin verður bert seldur um hóskandi boð fæst.

Síðani byrjan juni 2001 hevur verið stór framgongd so fyri rætta viðkomandi er talan um stórar avbjóðingar við góðum inntøkumøguleikum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Spf. Grannskoðarastovuna á Skála tlf. 44 16 66 og tosa við Eyðbjørg Thorleifsson ella Páll Højgaard.

Spf. Vársól
600 Saltangará

TANN **EINASTI** í FØROYUM

Nissan Primera 2.0 GT
Árg. 98 koyrt 51.000km
Hevur m.a. fj. Sentrallás, alarm, ac, leðursetur
Anlegg við Subwoofer
Tilsølu fyri kr. 135.000,-

Tel. 211211

FA. GRAVSTEINAR



Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰–17⁰⁰
annars sambært avtalu.

Vøruskrá kann fáast!

Grafsteinn - 31 77 74

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin.311820

Sethús og neyst í Sandavági

Vegna Føroya Skiftirætt verður ognin matr. nr. 92, Sandavágur við hesum lýst til sølu.

Húsini eru bygd í 1944 og umbygd í 1972.

Húsini eru til støddar uml. 39 m² í 3 hæddum.

Kjallari: Ikki innrættaður.

Miðhædd: Gangur, køkur, stova.

Loft: 4 kømur, baðirúm og gangur.

Grundøkið er 400 m².

Neystið er bygt á grundøkið, ið er 19 m².

Tað stendur skiftirættinum frítt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

Nærri upplýsingar um ognina fáast frá undirritaðu.

Advokatskrivstovan
Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn
Fríða Patursson, adv.
e-mail: frp@jura.fo
Tlf. 31 11 45

Bygningur til sølu/leigu

Við høvuðsvegin í Saltangará eru uml. 350 fermetrar á 1. hædd í ætlaðum nýggjum bygningi til sølu ella leigu. Kann býtast upp í fleiri partar.

Hølini eru væl egnað til skrivstovu ella matstovu. Bygningurin verður væntandi liðugur fyrst í 2005.

Keypari/leigari kann sjálvur vera við í avgerðini um innrættan av hølunum.

Góðir parkeringsmøguleikar.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Spf. Grannskoðarastovuna á Skála, tlf. 41 16 66 og tosa við Eyðbjørg Thorleifsson ella Páll Højgaard.

Spf. Vársól
600 Saltangará

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Leygardagin 14.08. kl. 20⁰⁰
Leygardagin 14.08. kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 15.08. kl. 20⁰⁰
Sunnudagin 15.08. kl. 22⁰⁰

Við danskari talu
Leygardagin 14.08. kl. 16⁰⁰
Leygardagin 14.08. kl. 18⁰⁰
Sunnudagin 15.08. kl. 16⁰⁰
Sunnudagin 15.08. kl. 18⁰⁰

Við enskari talu
Leygardagin 14.08. kl. 21¹⁵

Listastevnan
Leygardagin 14.08. kl. 17⁰⁰
Sunnudagin 15.08. kl. 16⁰⁰

Leygardagin 14.08. kl. 19⁰⁰
Sunnudagin 15.08. kl. 19⁰⁰

Leygardagin 14.08. kl. 23¹⁵
Sunnudagin 15.08. kl. 21⁰⁰

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu